Nr. 110/2019

Sirið Stenberg
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ávirkan á sjúklingar orsakað av koronu, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvørja ávirkan hevur koronusmittan havt á virksemið í sjúkrahúsverkinum ?
2. Hvussu nógvir sjúklingar hava verið noyddir at bíða eftir kanningum, viðgerðum, endurvenjing og øðrum ?
3. Hvussu eru virksemistølini í sjúkrahúsverkinum higartil í ár sammett við somu tíð í fjør ?
4. Hvat hevur verið gjørt fyri at byrgja fyri avleiðingum av útsettum sjúklingatænastum ?
5. Verður nakað serligt gjørt frameftir fyri at innheinta bíðilistarnar í sjúkarhúsverkinum ?

Viðmerkingar:
Koronu støðan er serstøk og hevur avleiðingar á samfelagið alt. Eisini í sjúkrahúsverkinum hevur koronutilbúgvingin kravt nógv, og vanliga virksemið hevur verið bæði ávirkað og skert.
Vit hava frætt, at fólk hava hildið seg aftur at fara til lækna, samstundis sum virksemið hevur verið skert í sjúkrahúsverkinum. Fyri nakrar sjúkubólkar er óivað okkurt, sum kann bíða, hóast tað hevur avleiðingar fyri fólk. Í øðrum førum kann størri vandi óivað verða, um álvarsom sjúka ikki verður funnin í rættari tíð, og neyðug viðgerð sett í verk. Eisini kunnu stórar avleiðingar verða av eitt nú manglandi endurvenjing, har førleikamissur í ringasta føri ikki kann endurvinnast. Umframt hetta koma sálarligu avleiðingar, sum eru av støðuni sum heild.
Spurningurin er, hvussu sjúkrahúsverkið, nú virksemið er økt aftur, kann innheinta bíðilistarnar, og hvørja tænastu fólk kunnu vænta at fáa. Eisini er áhugavert at fáa at vita, hvat hevur verið gjørt í koronutíðini fyri at byrgja fyri avleiðingum av niðursetta virkseminum í sjúkarahúsverkinum, og hvat verður gjørt frameftir hesum viðvíkjandi. Í eykajáttan herfyri er víst á, at Almannaverkið tørvar eyka pening fyri at fáa bøtt tey afturstig, sum teirra borgarar hava verið fyri orsakað av koronu. Spurningurin er tí eisini, um nøkur líkandi skipan er fyri sjúklingar, sum eisini hava verið fyri afturstigi.

Á Løgtingi, 19. juni 2020

Sirið Stenberg